## Laudrup tann triði

Mads Laudrup er triða ættarlið av kendu donsku fótboltsfamiljuni, sum ger um seg í bestu donsku røðini. 18 ára gamli FCK-spælarin varð skiftur inn móti endanum av útidystinum hjá FCK móti Horsens um vikuskiftið.

Abbi at debutantinum er Finn Laudrup, og pápin er sjálvandi navnframi Michael Laudrup. Hartil hevur pápabeiggin, Brian, jú eisini gjørt nógv um seg á fótbóltspallinum. Samstundis er Mads Laudrup eisini fyrsti danski spælarin frá árgangi 1989, sum spælir í donsku superliguni.



## Sendi áskoðarnar apríl

Tað var kanska ikki tann heilt stóra øsingin millum áskoðararnar í Gundadali sunnudagin. Talan var fyri tað mesta um ein sera róligan dyst, men ta einu ferðini syrgdi stadionvarparin tó fyri, at bæði B36- og KÍ-fjepparanir vóru á gosi. Hetta tá hann eftir 21 minuttum kundi kunngera, at støðan á Skála, har HB vitjaði, var 3-0 til Skála. Fagnaðurin var øgiligur, men skjótt raknaði onkur tó við, og tá varparin lítla løtu seinni kundi siga, at álmanakkin altso vísti 1. apríl, mundi stórur partur av áskoðarum smílast nakað.

B36-KÍ 1-0 (1-0):

# Linlig byrjan í Gundadali

*B36*

*KÍ*

**Spælið var á ongan hátt flótandi, men vertirnir vunnu sær trý stig, og tað bjargaði degnum hjá B36**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hvørki av liðunum vísti nakað serligt fótbóltsspæl, men B36 skoraði einasta málið og vann á KÍ*

Kurt Mørkøre kundi helst hugsað sær eina øðrvísi mótstøðu, nú hann fyri fyrstu ferð stóð á odda fyri øðrum liði enn KÍ í fremstu føroysku fótbóltsdeildini.

Øll mótstøðulið koma tó fyri tríggjar ferðir um árið í landskappingini, og tí máttu kenslurnar leggjast til viks, tá B36 legði fyri við heimadysti móti júst KÍ. Kenslur, sum ivaleyst eisini raktu Jákup Mikkelsen, Allan Mørkøre og Ova Nysted, sum allir hava sín uppruna í KÍ.

Á vøllinum sást tó ikki so nógv til, at B36 hevði hug at geva KÍ tað heilt stóra. Heldur kundi tað verið øvugt, tí tað man vera hampuliga langt síðani, at KÍ hevur framt eitt somikið tannleyst avrik, sum teir gjørdu sunnudagin.

B36 vann sær heilt skjótt eina greiða yvirvág í spæli, og fyrsta hálva tíman skaptu teir eisini onkrar góðar møguleikar. Tann størsta átti Fróði Benjaminsen longu eftir fýra minuttum, tá hann í góðari støðu stútaði beint á Meinhardt Joensen. Onkra aðru ferðina var eisini vandi á ferð, men eftir 23 minuttum fekk B36 hol á. Sylla, sum hóast alt gjørdist partur av liðnum hjá B36 í ár, takkaði fyri álitið, tá hann fangaði langa sending, sum Ove Nysted longdi inn um verjuna. Ivorianin var ískaldur og rundaði málverjan, áðrenn bólturin varð sendur í meskarnar.

### Tómgongd

Málið doyvdi spælið hjá B36 nakað, og tá KÍ heldur ikki hevði hug at svara stórvegis aftur, gjørdist talan um langa tómgongd restina av hálvleikinum.

Og fyri ein stóran part helt tómgongdin eisini fram eftir steðgin. Í øllum førum hugsaði B36 nú meira um verjuskyldurnar, og tí trektu teir seg leingi langt aftur á vøllin. Tað gav KÍ bæði tíð og pláss at spæla bóltin runt, men tað var so eiðasørt, at veruligir møguleikar spurdist burturúr. Sera sjáldan eydnaðist at spæla aftur um verjuna hjá B36, og tí komu flestu innleggini beint í pannuna á verjuspælarum, sum støðugt ruddaðu vandan burtur. Um nakað, so kundi B36 økt um munin, men Ove Nysted, sum spældi allan dystin í álopinum, sendi beint framvið, tá Meinhardt sera væl kom út ímóti.

### Ov lítið bit

At B36 í seinna hálvleiki sendi landsliðsspælaranar, Mikkjal Thomassen, Berg Midjord og Hanus Thorleifsson á vøllin, bøtti ikki tað stóra um spælið. Men hóast tað, so mundi tað kennast hugagott, at venjarin soleiðis kundi hvíla tríggjar somikið týðandi spælarar. Ikki minst tí Heini í Skorini og Johan V. Gunnarsson báðir arbeiddu sera væl sum avloysarar.

Eins og hjá KÍ, so er tó eingin ivi um, at meira ferð skal setast á, um liðið aftur í ár vil verða partur av oddastríðnum. Kanska var talan um tvey hálvgum rustað lið, sum fyrst skulu smyrjast. Men fyri Tony Pars man tað serliga vekja ans, at menn hansara ikki megnaðu at spæla seg til ein veruligan møguleika, hóast teir í næstan heilan hálvleik spældu á hálvuni hjá mótstøðuni.

## Ikki nóg gott

- Hatta var ikki nóg gott. Sum so haldi eg ikki, at nakað av liðunum vísti nakað serligt, og tað kemst kanska av, at talan bara var um fyrsta landskappingardystin, segði Heðin á Lakjuni, liðformaður hjá KÍ, eftir dystin.

- Vit skapa alt ov lítið gjøgnum allan dystin. Serliga í seinna hálvleiki fáa vit gott pláss, tá teir kanska bakka ov langt, men vit fáa ikki skapt nakrar vandastøður kortini. Einar tvær ferðir støkkur bólturin í fimmmetrinum hjá teimum eftir hornaspark, men okkara menn eru ikki til staðar at taka av møguleikanum.

Men alt hetta er kanska nakað, sum betrast, sum árið líður?

- Tað vóni eg, og tað eri eg eisini vísur í. Vit koma so ongan veg, um spælið ikki verður betri, enn tað var í dag.

## Kurt er B36'ari

Fyrst og fremst, so var Kurt Mørkøre eftir dystin nøgdur við, at hansara lið hevði vunnið sær trý stig í fyrstu royndini.

- Tað var tað, sum hevði størstan týdning, og sjálvt um talan ikki var um tað flótandi spælið, so vóru glottar at hóma. Fyrst og fremst í verjupartinum, har vit vóru sera kompaktir. Og so gevur tað okkum sjálvandi eyka ferð, at vit nú hava Sylla í álopinum.

Mótstøðuliðið hesaferð var barndómsfelagið hjá Kurt:

- Hjá mær er tað so, at nú eri eg B36'ari. Sum venjari vil tað jú altíð koma fyri, at tú kemur at dystast ímóti onkrum fyrrverandi felag. So í so máta var hetta ikki nakað, sum gjørdi dystin serligan fyri mítt viðkomandi, segði Kurt.